## Danmark hevur hægstu rentuna

Hóast tann danska rentan er søguliga lág í løtuni, er hon tann hægsta í Vesturevropa, og tann støðan verður neyvan broytt fyribils. Danska rentan er í løtuni 2,0 prosent og var tann sama sum í Noregi, men í gjár lækkaði norski tjóðbanmkin sína rentu, so hon er 1,5 prosent, og nú er Danmark einsamalt ovast á rentutindinum. Í gjár varð roknað við, at danski tjóðbankin fer at lækka rentuna 0,4 prosentstig til 1,6 prosent, men danska rentan verður framvegis tann hægsta í Vesturevropa. Danskir búskaparfrøðingar hava í seinastuni sagt, at danska gjaldoyragoymslan er so stór, at grundarlag er fyri einari lægri rentu enn teirri núverandi.

## Obama minni til verjuna



Í USA hevur stjórnin hjá Barrack Obama, forseta arbeitt við fleiri tiltøkum, sum skulu skerja útreiðslurnar á fíggjarlógini, og nú vilja vælvitandi keldur vera við, at sparingarnar koma at raka hervaldið í rættiliga stóran mun. Reuters skrivar úr Washington, at stjórnin hevur ikki færri enn 121 uppskot um sparingar, og at tey ætlandi verða løgd fram í dag. Bæði republikanarar og demokratar hava fýlst á, at hallið á fíggjarlógini fyri 2010 er ov stórt, og teir hava kravt, at stjórnin skuldi koma við sparingum. Tað ger hon so nú, skrivar Reuters. Sum skilst er tað ikki bara hervaldið, sum skal spara, tí tiltøkini raka eisini ein part av skúlaverkinum.

# Prísir á feskum laksi øktur við 10 krónum fyri kilo

**Tað gongur væl hjá føroyskum alarum at selja feskan laks í løtuni, og síðan fyrst í hesum árinum hevur eitt nú Vestsalmon í Kollafirði fingið heilar 10 krónur meira í miðal fyri kilo**

LAKSAPRÍSIR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyskir alarar eru í øllum góðum komnir aftur av matvørumessu í Brússel, og vónirnar um nýggjar avtalur um veiting av laksi og laksavørum – eisini til nýggjar keyparar - eru góðar.

Í Sosialinum herfyri segði sølu-og marknaðarleiðarin hjá Vestsalmon í Kollafirði, Bogi Johannesen, at amerikanskir keyparar á matvørumessuni í Brússel vístu føroyskum laksi rættiliga stóran áhuga, nú chilenska alivinnan er vorðin so fongd við ILA-smittu.

Tørvur er á laksi á amerikanska marknaðinum, og hetta hevur við sær, at amerikanskir keyparar leita eftir nýggjum veitarum til marknaðin.

### Eingin tollur

Bogi Johannesen sigur, at meðan eitt nú norðmenn noyðast at gjalda toll á heilum laksi til USA, eru føroyskir veitarar higartil slopnir undan toll.

- Norðmenn eru tí farnir at skera laks og selja hann sum flak á amerikanska marknaðinum, og tá sleppa teir undan tolli, sigur hann.

Sølu-og marknaðarleiðarin vísir á, at amerikanskir keyparar serliga hava víst áhuga fyri feskum laksi, bæði heilum fiski og laksafløkum, men áhugi er eisini fyri frystum fiski.

Virksemið hjá Vestsalmon snýr seg ikki um virking av fiski, men møguleikar eru at senda fisk til virkingar í eitt nú Skotlandi ella Danmark, sum síðan kann seljast víðari sum fløk.

- Flutningssambandið við Skotland og Danmark er hampiliga gott í løtuni, so hetta er avgjørt ein møguleiki, um tað fer at gerast áhugavert, sigur Bogi.

Tað er ikki vanligt á eini slíkari matvørumessu, at neyvar avtalur verða gjørdar millum seljarar og keyparar.

- Men vit hava fingið nógv nýggj sambond, bæði í USA og nógvastaðni kring um í Evropu og Asiu, og fyri okkara viðkomandi mugu vit siga, at messan eydnaðist sera væl, sigur hann.

Bogi Johannesen sigur, at longu nú selir Vestsalmon ein part av síni framleiðslu í USA, og mangt bendir á, at veitingarnar vestur um hav fara at veksa.

- Men hetta veldst sjálvsagt eisini um, hvussu nógvan fisk vit kunnu útvega, og hvør eftirspurningurin verður á teimum marknaðum, sum vit longu hava at røkja, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at Vestsalmon plagdi at selja stóra laksin, sum vigar 6 kilo og meira og eini 50% av framleiðsluni av sílum, til Ruslands, men russiski marknaðurin er ikki latin uppaftur enn.

- Tað er serliga stóri laksurin, sum hevur áhuga í Ameriku, meðan eitt nú Evropa leggur meira í fiskin, sum vigar nakað minni, sigur hann.

### Góðir prísir

Bogi Johannesen sigur, at framleiðslan hjá Vestsalmon av laksi í ár fer at liggja um eini 6.000-7.000 tons, meðan framleiðslan av sílum verður eini 5.000-6.000 tons.

Stutt um prísirnar, sum felagið fær í dag, sigur sølu-og marknaðarleiðarin, at heilur laksur liggur rundan um og omanfyri 30 krónur fyri kilo, sum er einar 10 krónur meira, enn tey fingu fyri hendan fiskin fyrst í hesum árinum.

- Jú, vit kunnu bara siga, at laksaprísurin er ógvuliga góður í løtuni, sigur Bogi Johannesen.



*- Spurningurin um amerikanska marknaðin, sum tykist áhugaverdur í løtuni, er eisini ein spurningur um, hvussu nógvan fisk vit kunnu útvega, og hvør eftirspurningurin verður á teimum marknaðum, sum vit longu hava at røkja, sigur Bogi Johannesen, sølu-og marknaðarleiðari hjá Vestsalmon*

FØROYA HANDILSSKÚLI



FØROYA HANDILSSKÚLI

**Postsmoga 177**
**110 Tórshavn**
**Tel 31 71 77**
**Telefax 31 33 74**
**www.fh.fo**

## Starv á Føroya Handilsskúla, Tórshavn

Søkt verður eftir avloysara til skrivstovu skúlans frá 1. august 2009 til 1. august 2010.

**Ábyrgdarøki**
Skráseting av HH- og HD-lesandi, samskifti við hesar bólkar umframt annað fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni.

**Førleikakrøv**
Skrivstovuútbúgving ella skrivstovuroyndir, hollan telduførleika og kunnleika at orða seg á føroyskum og enskum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum og viðkomandi skjølum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. mai 2009 og skulu sendast til:

Føroya Handilsskúli
Marknagilsvegur 77
Postrúm 177
FO-110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Meiri kunning um starvið fæst við at ringja til Tórhild Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 317177.

SENDISTOVAN